

*Eftir hesari gøtuni fer Andreas at slíta nógv spor komandi trý árini. Tað serstaka við hesum universitetinum er, at ymsar lærugreinar verða tiknar í teimum mongu sethúsunum eftir gøtuni. Tað er ikki alt savnað í nøkrum stórum bygningum*

# Yvir um jørðina at lesa

27 ára gamli havnarmaðurin, Andreas Andreasen, sigur seg ikki vera nakran ævintýrari, men fyri framman liggja trý ár í Wellington, Ný Sælandi har hann fer undir lesnað á Victoria University. Andreas sigur, at við tí hjálp og stuðli – serliga peningaliga -, sum er at fáa, er fjarstøðan tann størsti munurin í mun til at fara undir lesnað í Danmark

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Wellington, Ný Sæland:** Vanligt er, at føroyingar leggja sær leiðina uttanlands at lesa. Flestu fara til Danmarkar ella Noreg. Onnur fara til Onglands, men tey munnu ikki vera mong, sum velja at fara so langa leið, sum Andreas Andreasen. Hann kom til Wellington fyrst í november mánaði at nema sær útbúgving við universitetið í Wellington. Hann fer at lesa kunningartøkni. Ein útbúgving, sum í fyrstu atløgu kemur at taka trý ár. Um hann velur at fara víðari, so verða tað tvey ár afturat. Men tað veit havnarmaðurin ikki enn, um hann fer at gera.

– Fyrsta inntrykkið av býnum og fólkinum er sera positivt. Fólk eru opin og vinarlig, og gestablídnið er stórt, sigur Andreas, sum júst er komin til kaffistovuna, har vit hava sett honum stevnu henda vakra várdagin.

### Ikki Danmark

Andreas greiðir frá, at hann hevur arbeitt innan kunningartøkni seinastu tvey árini hjá FaroDane. Hann hevur studentsprógv og hægri handilsskúla.

Fyri einum hálvum ári síðani helt hann, at um hann skuldi fara undir lesnað, so var tíðin komin til tað. Hann vildi sleppa burtur frá Føroyum. Og hann tímdi ikki til Danmarkar, tí tað gjørdi tað ov lætt at hanga uppi í tí føroyska og Føroyum. So hann hugsaði fyrst um Ongland ella Skotland, áðrenn tankarnir fóru yvir um jørðina.

– At tað bleiv Ný Sæland var mest sum av tilvild. Ein vinur kom við uppskotinum, og eg helt, at tað ljóðaði spennandi, so eg fór út á netið at leita mær upplýsingar fram, greiðir havnarmaðurin frá.

Hann fann nøkur universitet, sum høvdu útbúgvingina, sum hann hevði ætlanir at taka. Hann sendi so umsóknir, og so var bólturin líka sum farin á rull.

– Síðani gekk tað skjótt. Orsøkin til, at tað júst bleiv Victoria University og Wellington er, at hetta var tað einasta universitetið, har útbúgvingin byrjar um summarið. Hinar byrjaðu allar í juli, og tað var ov stutt skoðbrá, sigur Andreas.

### Nógvur vindur

Uttanfyri skínur sólin, men tað er eisini nógvur vindur. Og tað sigur Andreas, at hann ikki hevði væntað.

– Eg visti ikki, at tað var so nógvur vindur her. Hetta er næstan sum í Føroyum, bara lýggjari, sigur hann og flennir.

Wellington verður ofta kallaður Windy Wellington av ný sælendarum. Og tað er ikki av ongum. Býurin er sera eyðkendur, tí at tað eru eitt ótal av bakkum, har hús standa millum trø og runnar. Nógv hús standa sera ovarlaga, og har er tað serstakliga vindhart. So tað er ikki so langt við síðuna av at siga, at tá vindurin leikar í, at tað minnir eitt sindur um vetrarvindin í Føroyum.

### Nógvir tjóðskapir

Andreas býr á einum næmingaheimi í forstatinum Karori, sum liggur umleið ein tíma til gongu frá universitetinum. Men flutningurin við bussi er ongin trupulleiki.

Á næmingaheiminum búgva nógv onnur, sum eru allastaðnis frá í heiminum. Andreas letur væl at. Hann sigur, at hann eftir bara einari viku er komin at kenna fleiri og hevur fleiri at halda saman við.

– Vit hava øll tað í felags, at vit eru komin higar at lesa, og øll vilja læra hvønn annan at kenna. So tað er ongin trupulleiki, sigur hann.

Men so at siga ongin veit, hvat tað er fyri eitt land, sum Andreas kemur frá.

– Tey flestu rista við høvdinum og vita ikki, hvat tað er. Tað er higartil bert ein, sum hevur hoyrt um Føroyar. Og viðkomandi var føddur í Hetlandi, so tað er kanska ikki so sjáldsamt, sigur Andreas smílandi.

### Góða hjálp

Andreas letur væl at hjálpini frá Altjóða skrivstovuni í Føroyum, sum hevur hjálpt honum væl við peningaligu viðurskiftunum viðvíkjandi útbúgvingini.

Tað kostar 15.000 ný sælendskar dollarar um árið hjá einum útiseta at lesa í Ný Sælandi. Tað er umleið 60.000 krónur. Tað verður goldið av ÚSUN, sum er stuðulstovnur til lesandi føroyingar uttan fyri Skandinavia. Umframt hetta so fær Andreas SU úr Danmark.

– So sært tú, tað er so at siga ikki so stórur munur á at lesa her og so í Danmark. Fjarstøðan sjálvandi og so tað mentanarliga. Men mítt fyrsta inntrykk herfrá er so mikið gott, at eg ivist ikki í, at eg fari at trívast her, sigur Andreas Andreasen, sum byrjaði skúlan tann 17. november. Og fyri framman liggur eitt spennandi tíðarskeið, har hann uttan iva fer at uppliva mangt og hvat í einum fjarskotnum landi, meðan hann nemur sær útbúgving.



# Tað er tað vert

Fyri summi – serliga fólk við flogræðslu – kann ein túrur yvir um jørðina í flogfari tykjast øgiligur. Einar 25 tímar tilsamans í flogfari verður tað tá til, men tá ein sjón sum sólarrisið yvir Sydney í Avstralia tekur ímóti, so er tað alt stríðið vert



*Havsbrúgvin við Sydney í Avstralia tíðliga um morgunin júst sum sólin rísur. Mynd tikin í eini hædd upp á 37.000 føtur. Eitt tílíkt sólarris upplivir ein ikki á hvørjum degi*

FERÐA-
FRÁSØGN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Sydney, Avstralia:** Flogferðin til Ný Sæland byrjaði í Føroyum týsdagin tann 28. oktober. Teir báðir tímarnir í flogfarinum hjá Atlantsflogi til Danmarkar var ein lítil smakkiroynd upp á tað, sum lá fyri framman. Men kortini var tað tíbetur onki, sum kundi fyrireika okkum upp á ferðina, sum lá fyri framman. Tíbetur, tí annars er spurningurin, um vit høvdu farið.

Havast skal í huga, at ferðalagið hjá okkum telur fýra børn, eitt ársgamalt, eitt trý ára gamalt og tvey upp á fýra ár og so trý vaksin. Men sigast skal beinanvegin, at um vit so vóru tíggju vaksin, so hevði onki kunnað stytt um tíðina hjá børnunum í Thai Airways flogfarinum tvørtur um knøttin.

Vit steðgaðu eina nátt í Keypmannahavn, áðrenn farið varð víðari. Tí tað gav ein náttarsvøvn hjá øllum. Hetta hildu vit vera sera skilagott. Og tó…úrslitið var, at onki av børnunum svav nakað serligt á flogtúrinum til Bangkok, sum vardi knappar tíggju tímar. Men túrurin var tó ikki so galin, tað torførasta var bara at finna upp á okkurt til børnini, so tíðin kundi ganga. Tí eitt flogfar er ikki tað rúmsháttasta til børn. Hini ferðafólkini skulu tó eiga, at tey vóru sera tolin og søgdu ikki nógv, hóast tað til tíðir kundi verða eitt sindur av grenji og gráti. Onkur hugdi eitt sindur illur, men sum heild vóru øll skiljandi. Hvat er at gera? Tey flestu munnu vera greið yvir, at foreldur, sum ferðast við teirra smábørnum royna sítt besta fyri ikki at órógva hini ferðafólkini meira enn allarhægst neyðugt.

### Kvalandi hiti

Komin til Bangkok um sjeytíðina hósmorgun. Nú hava vit flogið í tíggju tímar og flutt klokkuna sjey tímar fram. So jetlag er so smátt farið at gera vart við seg. Vit skulu steðga í Bangkok í 11 tímar, so nú skal sovast.

Hotellið liggur umleið 20 minuttir í bili frá flogvøllinum. Men tað ringasta er tann kvalandi hitin, sum tekur ímóti. 30 stig og ikki eitt lot. Ein fær nærum ikki luft. Men hotellkømrini hava "air-conditioning", so tað er ikki so galið at vera inni.

Hotellið hevur ein uttandurasvimjihyl, so tað fyrsta børnini gera er at leypa útí. Hetta man vera ein av teimum fyrstu ferðunum, at tey hava svomið úti um áttatíðina um morgunin…

Teir fimm tímarnir av svøvni, sum øll fingu í Bangkok, gjørdu væl. Men tíbetur var tað ikki nóg mikið, tí øll svóvu tey meginpartin av túrinum til Sydney. Meginpartin vil siga fýra av teimum átta tímunum, sum ferðin tók. Men eftir túrin til Bangkok, skal ikki nógv til fyri, at hesin verður betur enn hann.

Tann seinasti tímin er sera langur. Tykist ikki at fáa nakran enda.

»Nú eru vit har skjótt« ella »Nú verður tað ikki so longi afturat« munnu vera teir mest slitnu og nýttu setningarnir á hesi ferðini. Tíverri nyttar tað ikki altíð so nógv at siga – í øllum førum ikki við eitt eitt ára gamalt, sum hevur fingið nóg mikið av flogferðum.

### Einastandandi tænasta

Sigast skal tó, at tænastan umborð á Thai Airways flogførum er einastandandi góð. Ein ørgrynna av flogternum renna runt allatíðina og bjóða tær at eta, drekka ella hvat ein nú hevur tørv á. Stuttligt er eisini at síggja, hvussu hugtiknir asiatar eru av børnum. Hvørja ferð tey koma fram við setrunum, har børn sita, taka tey sær tíð til at fjasa við børnini. Hóast tey hava úr at gera.

Spildurnýggir filmar koyra allatíðina á stórskíggjunum og í millum teir kemur flogleiðin fram saman við upplýsingum um, hvar vit eru, hvussu langt uppi, hvat klokkan er og hvussu langt og longi tað er eftir at flúgva.

Flogternurnar eru somuleiðis sera hugtakandi at síggja. Íklæddar fótsíðum niðurdeilum og jakkum ella klædningum úr Thai-silki í alskyns vøkrum og sterkum litum, geva tey flogfarinum ein heilt serligan dám.

Eitt sindur torført er tað tó at venja seg við, at tey bukka fyri einum. Serliga beint tá ferðafólkini koma umborð og fara í land. Tá standa tey við samanløgdum hondum framman fyri andlitið og bukka, meðan tey siga góðan dag, farvæl ella takk á skiftivís enskum og thailendskum. Tey eins væl og øll onnur vita, at ferðin er long og drúgv og krevur nógv. Serliga tá smábørn eru við, so tey leggja alla orku í at gera ferðina so góða sum yvirhøvur gjørligt. Og tað eydnast teimum til fulnar, tí teirra partur liggur so sanniliga ikki eftir.

### Sólarris

Myrkrið uttan fyri vindeygað er eisini keðiligt. Ein kann ikki eingongd biðja børnini hyggja út at skýggjunum undir okkum.

Men brádliga byrjar havsbrúgvin at lýsna. Skjótt gongur, og hon fær ein myrkabláan kant. Lítla løtu seinni er kanturin vorðin heilt ljósur og okkurt reytt hómast eisini.

Síðani kunnu orð ikki lýsa tað, sum kemur til sjóndar. Sólin kemur spakuliga upp, meðan himmalin verður reyður, nærum violettur. Sjálvt børnini sita hugtikin, friðarlig og hyggja.

»Mamma, er hatta sólin?« Soleiðis hevur hon ongantíð sæð út í Føroyum. Og tó. Ein hevur bara helst ongantíð sæð sólarris í Føroyum úr eini hædd upp á 37.000 føtur í einum Boeing 747 hjá Thai Airways.

Burtur eru allir tankar um hendan langa túrin og burtur eru somuleiðis allir tankar um, at tað framvegis eru knappir tríggir tímar eftir í flogfarinum. Frá Sydney til Auckland í Ný Sælandi.

Tað einasta sum er til, er sjónin uttanfyri flogfarið og tankin um at fáa fast undir føturnir í einar tveir tímar aftur, áðrenn farið verður undir tann stytsta teinin á túrinum. Sum tó helst fer at tykjast sum tann longsti, tí nú tíma vit ikki meira. Ongin av okkum. Og allarminst børnini.

Men sjálvt tey verða smittað av hesi vøkru sjón. Og tá kann ein ikki hugsa annað, enn at henda langa ferðin var tað vert.